

# Veggurin klovnaði

**Føroysku Fía og Martin og børn teirra lógu í fasta svøvni, tá ein ein bilur sunnumorgunin buldraði inn í hús teirra í Holbæk í Danmark**

Randi Jacobsen

Fyri tveimum mánaðum síðan fluttu Fía Svanekier, Martin Hummeland og bæði børn teirra í húsini, tey høvdu keypt sær í Hornbæk í Danmark. Áðrenn tey fluttu inn, vórðu stórar ábøtur gjørdar á húsini.

Nú er øll umbyggingin smildrað sundur, og húsini mugu aftur hava stórar ábøtur.

Tað hendi alt eftir einari lítlari løtu sunnumorgunin.

Klokkan var eitt koter til fimm, tá ið Fía vaknaði við einum braki.

– Hon hoyrdi eitt hvin, og glas, sum smildraðist og tann niðurundir. So vaknaði eg eisini og rann niður aftan á henni, sigur Martin Hummeland.

Allastaðni lá dust.

### Bilurin kroystur inn í húsini

Tey fóru útum, og har stóð ein spildurnýggjur AUDI A4 kroystur inn í veggin.

Tað reyk úr bilinum, sum eingin var í.

Fyrsti tanki teirra var, at onkur hevði fingið skaða.

Tá kom ein maður gangandi úr urtagarði teirra yvir móti bilinum.

– Hann tóktist ógvuliga skelkaður og spurdi eftir einum vinmanni. Vit ryndu at sissa hann og vingu mannin inn í húsini og góvu honum vatn at drekka.

Beinanvegin hevði Fía ringt til politiið, sum kom tá.

Sambært eb.dk greiddi hesin maðurin politinum frá, at ein vinmaður hansara hevði koyrt bilin, men tá ið eingin annar var at finna, handtók politiið henda mannin. Maðurin vísti seg at vera ein kendur ungur danskur poppsangari, Arian.

Fía og Martin vita ikki, um tað var hesin maðurin ella ein annar, sum koyrdi bilin. Tí málinum tekur politið sær av.

### Flutt út

Hús teirra fóru ógvuliga illa, og veggurin á húsunum klovnaði.

Beint eftir óhappið noyddist familjan at fara á gistingarhús at vera, men tey royna at finna ein varandi bústað, meðan hús teirra verða umvæld. Alt má gerast av nýggjum aftur, tí so nógv er knúst.

– Hùsini verða sum nýggj aftur, sigur Martin.

Martin Hummeland starvast sum tyrluskupiari hjá Atlantic Airways. Fía Svanekier er sjúkrarøktarfrøðingur á Ríkissjúkrahúsinum.

---

# Birgir Páll skjótt leysur

**Íslendingurin, sum dømdur varð í Føroyum í einum umfatandi rúsevnismáli, sleppur við hálvari revsing**

Randi Jacobsen

Íslendingurin Birgir Páll Marteinson, sum í einum nevningatingi í Føroyum í 2008 varð dømdur sjey ára fongsulsrevsing, verður skjótt latin leysur.

Hann hevur frá íslendsku rættarmyndugleikunum fingið eftirgivið helvtina av dóminum og verður leysur 2. mars næsta ár, upplýsir hann á Facebook.

Birgir Páll Marteinsson var ein av teimum dømdu monnunum í sonevnda Norðstjørnumálinum. Hann tók ímóti bátinum, sum kom úr Noregi og á veg til Íslands legði inn í Føroyum. Birgir Páll Marteinsson koyrdi í fleiri dagar runt í landinum við eini stórari nøgd av sterkum rúsevnum.

Hann varð fyrst fluttur til Danmarkar at sita, men stutt eftir fluttur til Íslands.

### Óynsktur í Føroyum

Dómurin var eisini, at Birgir Páll Marteinsson ikki skal vísa seg aftur í Føroyum. Hetta forboð vil hann fegin hava avtikið, ikki minst í hann hevur føroyska unnustu.

Tað verða tó ikki íslendsku men føroysku/donsku myndugleikarnir, sum fara at taka støðu til eina slíka umbøn.



*Birgir Páll Marteinsson varð dømdur í einum nevningatingi í apríl 2008*

---

## Olaf Johansen koyrdur

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelagnum hevur bururvíst skrivaranum, sum felagið hevur havt í meira enn 35 ár

Í 35 og eitt hálvt ár hevur Olaf Johansen starvast sum skrivstovumaður í Føroya Fiskimannafelag.

Tað ger hann ikki longur.

Mikkjalsmessudag fekk hann boðini frá Jan Højgaard, formanni felagsins, at hann varð burturvístur.

Jan Højgaard vil ikki upplýsa grundgevingina, men sum skilst snýr tað seg ikki um nakað álvarsligt óreglusemi við peningi.

Burturvísing er ógvuligasta stigið, tá ið ein arbeiðsgevari vil av við starvsfólk. Tað stigið verður vanliga bara brúkt í sambandi við eitt nú svik, grova misrøkt ella illoyalitet.

Hjá einum burturvístum starvsfólki er einki sum eitur uppsagnartíð, og tí missir starvsfólkið eisini beinanvegin rættin til løn.

rj

## Situr framvegis

Ein 25 ára gamal maður, sum í Føroya rætti varð dømdur fýra mánaða fongsulsrevsing, situr framvegis varðhaldsfongslaður.

Maðurin varð dømdur fyri tvey innbrot eftir heilivági á Landssjúkrahúsinum.

Hann hevði frammanundan ein átta mánaða fongsulsdóm, sum hann fekk í 2008 m.a. fyri harðskap, rán og innbrot, og tann dómurin var ikki úti av verðini, nú hann aftur var fyri rættinum.

Ákæruvaldið kærdi nýggja dómin og fekk viðhald frá rættinum í, at maðurin skal sita í varðhaldinum, til málið kemur fyri landsrættin. Grundgevingin er ótti fyri, at sleppur hann út, kann hann finna uppá at gera líknandi brotsverk aftur.

rj